# Suðuroyingar mugu standa meira saman

**Ein sameind Suðuroyggj hevði staðið sterkari, heldur løgmaður**

KOMMUNU-SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Ein sameind Suðuroy hevði havt lættari við at fingið síni ynski gingin á møti og hon hevði megnað at loyst fleiri uppgávur sjálv, sum allar kommunurnar nú mugu til Havnar at loysa hvør í sínum lagi, heldur løgmaður*

– Tað er neyðugt hjá Suðuroyingum at standa meiri saman.

Tað heldur Jóannes Eidesgaard, løgmaður.

Jóannes Eidesgaard er suðuroyingur. Hann er gamal býráðspolitikari á Tvøroyri og vit hava spurt hann, hvat hann heldur um kommunala samstarvið í tí valdømi, sum hevur valt hann inn á Føroya Løgting og sum hevur ført hann í landsins hægsta sess.

Hann vil ikki gera seg til talsmann fyri at Suðuroyggin skal leggja saman til eina kommunu.

– Tað vildi verið skeivt av mær at komið við eini fráboðan um hesi viðurskifti, serliga beint uppundir eitt kommunuval.

Kortini ivast løgmaður ikki í, at tað er neyðugt at suðuroyingum at standa meiri saman enn teir gera nú.

– Tey allarflestu munnu vera samd um, at tað er umráðandi, at Suðuroyggin stendur meiri saman mótvegis landinum annars.

– Hvussu kann hon standa meiri saman, uttan at leggja saman?

Møguliga er samanlegging loysnin. Men í øllum Føroyum er tað neyðugt at samstarva meiri, tí eini meiri sameind oyggj, hevði staðið seg betri í kappingini ímóti landinum annars.

Løgmaður sipar til Norðoyggjar, sum eru rættiliga sterkar í teirra ynskjum, júst tí at har er ikki sami tvídráttur ímillum ymisk øki, sum tað eru í Suðuroy.

Heldur tú so at Suðuroyggin hevði staðið sterkari, var hon ein kommuna.

– Ja, tað hevði hon gjørt, sigur løgmaður.

## Lættari at fingið ynski gingin á møti

Hann heldur, at tað hevði verið lættari hjá suðuroyingum at fingið síni ynski gingin á møti, stóð oyggin saman.

– Men stóð øll oyggin saman, hevði tað eisini verið nógv lættari at bjóðað seg fram og at bjóða ymsar tænastur fram.

Hann nevnir kommunalu umsitingina sum eitt dømi.

– Hevði øll Suðuroyggin eina felags, kommunala umsiting hevði umisitingin verið nóg sterk til at hon hevði sjálv megnað at loyst nógvar uppgávur í Suðuroynni, sum allar kommunurnar í oynni nú, hvør í sínum lagi, fara norður til Havnar at fáa loyst.

Sum dømi nevnir hann bæði verkfrøði og aðrar, tekniskar uppgávur, fíggjarligar uppgávur og kanska eisini løgfrøðiligar uppgávur, og tað kundi skapt fleiri arbeiðspláss í oynni til fólk við útbúgving.

– Hetta haldi eg, er tann gongda leiðin, heldur Jóannes Eidesgaard.

# Má gerast við størsta varssemi

**– Skal farmaflutningurin hjá Strandferðsluni einskiljast, má tað undir ongum umstøðum ganga útyvir tænastuna til útjaðaran**

EINSKILJING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tænastan til útjaðaran má ikki gerast verri.

Tað sigur Hendrik Old, løgtingsmaður úr Suðuroy, nú røddir eru frammi um at einskilja farmaleiðirnar hjá Strandferðsluni.

À fíggjarlógini fyri næsta ár, hevur Landsstýrið ætlað at selt bilar hjá Strandferðsluni fyri 15 milliónir krónur.

Hendrik Old er ógvuliga eymur um farmaleiðirnar og hann hevur meiri enn einaferð nevnt Farmaleiðirnar fyri lívæðrina hjá útjaðaranum í Føroyum.

Og hann sigur, at skal pilkast við tær, skal tað gerast við størsta varsemi.

– Vit fáa ongantíð farmaflutningin til újaðaran at kasta nakað av sær. Tí mugu vit hugsa okkum sera væl um, áðrenn vit einskilja farmaleiðirnar.

– Hinvegin haldi eg ikki, at tað er ein almenn uppgáva at koyra farm runt í miðstaðarøkinum fyri heilsølur av ymsum slagi.

– Tað eigur at verða á privatum grundarlagi, heldur hann

– Men tað er júst hetta, sum Farmaleiðir eru endaðar við, hóast upprunaliga endamálið varð at tryggja útjaðaranum og útoyggjunum farmaflutning fyri rímiligan kostnað.

## Tíðin komin at endurskoða

Hendrik Old vísir á, at um tvey ár, er koyrandi heilt úr Gásadali og Viðareiðis og tí er tað natúrligt at Farmaleiðirnar verða endurskoðaðar

Og í tí sambandi eiga vit at gera púra greitt, hvat er ein almenn tænasta og hvat er vanligt, vinnuligt virksemi.

– Eg haldi, at tað er semja í samgonguni um, at tænastan til útjaðaran skal ikki versn og at tað framvegis eigur at vera ein almenn tænasta at tryggja útjaðaranum flutning.

– Hinvegin er eisini semja um at tað er rætt at hyggja eftir tí partinum av Farmaleiðum sum má metast at vera vanligt, vinnuligt virksemi.

Men er flutningurin í miðstaðarøkinum ikki við til at tryggja Farmaleiðir fíggjarliga, so at tær eru førar fyri at veita útjaðaranum ta neyðugu tænastuna.



*Ein spurningur er, um tann parturin av virkseminum, sum gevur vinning, skal einskiljast, so at Strandferðslan bara situr eftir við tí virkseminum, sum gevur hall, sigur Hendrik Old*

– Tann vandin er stórur og tað hevði verið endamálsleyst. Júst tú er hetta eitt mál, sum sum má lýsast út í æsir, áðrenn nøkur stig verða tikin.

Farmaleiðir hava eisini eitt samanhangandi net av flutningi. Missa tær ein stóran part av flutninginum í miðstaðarøkinum, fer tað at føra við sær, at lastbilarnir fáa minni og so verður tað dýrari upp á seg. Stúrir tú ikki fyri, at ein partvís einskiljing sostatt fer at máa fíggjarliga støðið undan Farmaleiðum og fer at máa støðið undan tí samanhangandi netinum sum er, og sum ger, at farmur kann flytast samanhangandi úr einum enda í landinum í hin?

– Hetta eru sjálvandi eisini týdningarmiklir partur. Tað verður neyðugt at tryggja eitt samanhangandi net og at goymslurnar verða varðveittar, so at farmur, sum kemur úr øllum krókum í landinum, kann leggjast á eina skipaða móttøku og kann avgreiðast víðari, og hetta má ikki fara í upploysn, sigur Hendrik Old.




*– Tað er semja í samgonguni um, at tænastan hjá Farmaleiðum til útjaðaran skal varðveitast. Hinvegin er eisini semja um at endurskoða flutningin í miðstaðarøkinum, sigur Hendrik Old*



# Gekk burtur vestan fyri Spania

**Seglbáturin Svalan ur Trongisvági sakk fríggjakvøldið út fyri spanska útnyrðingshorninum. Eingin vandi var nakrantíð fyri manningini, greiðir skiparin frá**

SKIPBROT
*Edvard Joensen*

Seglbáturin Svalan úr Torngisvági sakk fríggjakvøldið út fyri spanska útnyrðingshorninum. Tvey fólk vóru umborð, og tey vóru ongantíð í nøkrum vanda, greiðir Viberg Sørensen, eigari og skipari á Svaluni, frá.

Hann sigur, at tey sigldu á einhvønn reka, sum gjørdi hol í bakborðsbógv. Hevði lensipumpan, sum spanska bjargingartænastan setti umborð á Svaluna, ikki gingið fyri, hevði báturin uttan iva verðið bjargaður, sigur Viberg Sørensen.

Pumpan, sum kom umborð, kláraði væl at halda bátinum lens. Men hon steðgaði. Og áðrenn tað eydnaðist at fáa aðra pumpu umborð, sakk Svalan.



*Viberg og Jóna Sørensen vóru einsamøll umborð á seglbáti teirra Svaluni, tá hon fór at leka og sakk út fyri sponsku strondini fríggjakvøldið*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

## Longri ferð

Viberg Sørensen og konan Jóna vóru tveyeini farin eina longri ferð við seglbáti teirra Svaluni.

Tey vóru farin umborð í Wales og ætlaðu sær suðuryvir. Tey høvdu siglt suður gjøgnum Írska Havið, fram við ensku suðurstrondini og um Ermasund. Høvdu síðan fylgt europeisku strondini suður um Biscayavíkina.

Tey fóru úr La Coruna í útnyrðings Spania um ellivutíðina fríggjadagin. Sigldu vestur við strondini og fóru um Cape Finesterre, greiðir Viberg Sørensen frá.

Um seks tíðina um kvøldið vóru tey stødd einar tríggjar-fýra fjórðingar úr landi eitt sindur sunnan fyri høvdan. Veðrið var av tí besta. Eitt lot aftaná, so báturin gekk heilt væl við seglum. Tey sótu og ótu og hugnaðu sær á dekkinum, tá tey merktu eitt harðligt sett í bátinum.

– Eg leyp aftur á hekkuna at hyggja eftir, hvat hetta var, vit sigldu á, men sá einki. Síðan fór eg niður í maskinrúmið at vita, um sjógvur var har. Men har var alt í lagi. So niður í lugarið, og har var sjógvur at síggja. Tá eg so hugdi fram í ketukassan, sá eg, at hann var fullur av sjógvi, sigur Viberg Sørensen.

Hann sigur, at hann sá eina sandstrond beint innan fyri tey og setti motorin í gongd og sigldi við fullari ferð móti landi við teirri ætlan at seta bátin á land har.

## Sleipaður

Viberg Sørensen sigur, at hann sendi neyðakall, beinanveg, hann var varugur við, at báturin lak, og fekk at vita, at ein bjargingarbátur og ein tyrla frá sponsku bjargingartænastuni vóru á veg.

Meðan siglt varð móti landi, gekk lensipumpan sjávandi. Men um hálvgum átta tíðina um kvøldið, tá tey vóru umleið hálvfjórðing úr landi, steðgaði maskinan, tí so nógvur sjógvur var í maskinrúminum.

Spanski bjargingarbáturin var nú komin til Svaluna, og ein lensipumpa varð sett umborð. Hon kláraði skjótt at tøma bátin, so tað sá bara heilt væl út, greiðir Viberg Sørensen frá. Sjálvur varð hann verandi umborð á Svaluni saman við einum spanióla. Konan fór umborð á bjargingarbátin. Gjørt varð av at sleipa Svaluna til eitt útróðrarpláss eitt sindur norðari.

– Veðrið broyttist eitt sindur, og tað gjørdist meira drabbut, í myrkrinum. Og so steðgaði lensipumpan, sum komin var umborð. Vit arbeiddu upp á hana. Hetta var ein pumpa, sum skuldi startast sum ein páhangsmotrur við snóri. Spaniólin var so óheppin, at hann sleit snórin, og so fór hon ikki í gongd aftur. Sjógvurin vaks nú skjótt aftur í bátinum, og hóast bor vórðu send eftir nýggjari pumpu, sá eg skjótt, at her gjørdist galið, sigur Viberg Sørensen.

Teir fóru umborð á bjargingarbátin og kundu bara standa og hyggja at, meðan Svalan tyngdist alt meira og meira.

– Klokkan 22.25 fór hon á høvdið og stakk afturendan beint upp í loft. Har stóðu konan og eg og sóu hana fara undir eftir høvdinum. Tað seinasta, vit sóu, var tað føroyska flaggið, sum hvarv. Tað var ein ræðulig kensla, sum eg vildi verið fyri uttan, sigur Viberg Sørensen.

Í bygdini, tey komu til, var eitt bátafelag, sum tók væl í móti teimum og sýndi teimum stórt hjálpsemi, sigur hann.

Svalan sakk á 52 metra dýpi, og verður neyvan tikin uppaftur. Hon var tryggjað, segði Viberg Sørensen, tá Sosialurin tosaði við hann í telefon úr Odense, har hann var staddur mánadagin.



*Snotuligi seglbáturin Svalan úr Trongisvági sakk, eftir at hol var komið á bakborðsbógv undir vatnlinjuni. Lensipumpan hjá sponsku sjóverjuni gekk fyri, og spaniólar vóru ov seinir við nýggjari pumpu*

*Mynd: Áki Bertholdsen*




*Svalan sakk beint sunnan fyri Finisterrehøvdan við spanska útnyrðingshornið*